# Messing í Miðlahúsinum

KONSERT
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Týskvøldið 30. oktober høvdu Havnar Ungdómshornorkestur og Tórshavnar Messing Kvintett eina sera góða, hugnaliga og øðrvísi konsert í Miðlahúsinum.

Tann vælljómandi messingkvintettin úr musikkskúlanum í Havn, mannað við Kenneth Jones, Karolinu Hentze, Biritu Mortensen, Niklasi Mouritsen og Regini Berg, spældi fyri fullsettum miðlahúsi. Á skránni vóru Joplin, Strauss, Sousa, Jacques og Alberg.

Á skránni hjá Havnar Ungdómshornorkestri var Siebert marsjur, Heykens serenada og nøkur føroysk songløg. Orkestrið, sum seinastu árini m.a hevur spælt konsertir í New York, San Francisco og Paris, hevur í ár fingið nakrar yngri spælarar við.

Tað eru musikklærararnir Kenneth Jones og Ólavur Olsen, sum venja orkestrið. Musikkskúlin fer í framtíðini javnan at skipa fyri konsertum við næmingunum í Miðlahúsinum.







*Frá konsertini í Miðlahúsinum nú um dagarnar*
*Myndir Jan Müller*



*Brekku Brothers hava havt fleiri konsertir í Miðlahúsinum*

# Brekku Brothers á konsertferð

**Spæla fyrstu konsertina í Miðlahúsinum í kvøld**

TÍÐINDASKRIV

Hesa vikuna fer bólkurin Brekku Brothers at spæla útgávukonsertir í Føroyum.

Fyri einum mánaða síðan lat bólkurin úr hondum fløguna ”BrekkuBrothers Vol II ”From Boston To Tórshavn”, og er tað í hesum sambandi, at føroyingar fáa høvi at hoyra bólkin.

Hesaferð vitjar BB Havnina, Eiði og Vágarnar.

Brekku Brothers eru (eisini) vornir heimskendir í Føroyum fyri teirra sera fyrikomandi og undirhaldandi konsertir, og eina ella tvær kaninir koma altí- upp úr hattinum, tá teir stórhugna sær saman vid lurtaranum.

**Konsertskrá**

7. nov kl. 21.00, Miðlahúsið
8. nov kl. 20.00, Miðvágs skúla
9. nov kl. 19.00, Felagsskúlin á Oyrabakka

Í Vágunum og á Oyrabakka skipar bólkurin saman við musikkskúlunum fyri opnari venjing.

Her ber til hjá musikskúlanæmingum at seta spurningar og hoyra bólkin fyrireika seg.

Brekku Brothers eru í jólagávuhýri, og fólk kunnu ognd sær ”Vol II From Boston to Tórshavn” til serstakan jólaprís.